# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Til minnis um systur mína Sigrid



*Sigrid og maðurin, Brandur*

Eg vil við nøkrum fáum orðum lýsa nøkur orð um mína elskaðu systir Sigrid, sum var elst av okkum 8 systkjum. Tað vóru ikki nøkur løtt boð at fáa, tá ið Signar, sum er yngst av trimum børnum hjá systi, segði at mamma hansara var farin heim til tann stað, har vit øll bíða eftir. Sigrid bleiv einans 65 ára gomul.

Hon flutti til Havnar sum ung, nam sær útbúgving og arbeiddi sum læknaskrivari í 28 ár á Landssjúkrahúsinum. Síðan flutti hon til Danmarkar, har hon og Brandur búðu í 3 ár. Tey komu síðan heim aftur til Føroyar og vóru her í nøkur ár, til tey gjørdu av at flyta til Íslands.

Sigrid eigur ein son, sum hevur búð í Íslandi í mong ár og arbeiðir sum maskinverkførari. Yngri beiggi hansara, sum eisini er maskinverkførari, býr í Havn. Elst av teimum er Ingun, sum hevur lærarútbúgving.

Til tykkum, ið eftir sita í hesi syrgiligu løtu, vil eg at Harrin gevur tykkum styrki til at liva víðari. Eg vil hervið lýsa frið yvir mína elskaðu systir.

Heilsan

**Tórhallur**

*Fuglafjørður 31. august*

## Benny Ejdesgaard nýggjur koyrilærari

Í mai 2005 tók Benny Ejdesgaard í Havn prógv sum koyrilærari á Dansk Kørelærerskole. Hesin skúli verður mettur sum ein tann fremsti innan sítt øki í Danmark.

Benny hevur stovnað koyriskúlan KOYRILÆRARIN, og mánadagin 12. september byrjar fyrsta skeiðið.

Frá komandi viku av kemur heimsíðan hjá koyriskúlanum at virka, og tá ber til lat fáa upplýsingar um koyrifrálæru og annað í hesum sambandi á: www.koyrilararin.fo

Benny sigur, at tey ið vilja ogna sær koyrikort til persónbil kunnu tekna seg til at byrja mánadagin 12. september við at ringja á tel. 212001.



*12. september 2005 byrjar fyrsta skeiðið hjá Benny Ejdesgaard, sum er útbúgvin koyrilærari á Dansk Kørelærerskole*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Alarmsentralurin nýggja tøkni



**Alarmsentralurin 1-1-2 hevur tikið nýggja tøkni í brúk fyri enn betur at tryggja samskiftið við borgaran. Talan er um eina telduskipan, sum sjálvvirkandi goymir allar telefonsamrøður, sum fara fram um alarmsentralin**

TÍÐINDASKRIV

Alarmsentralurin krevur støðuga útbygging fyri at nøkta tørvin frá samfelagnum, eins og verandi tøkni skjótt gerst átíðarhóskandi og í ringasta føri óálítandi.

Fiskimálaráðið, sum hevur samskipandi ábyrgdina fyri tilbúgving í Føroyum, hevur fíggjað skipanina, sum nú er sett í verk. Tekniska loysnin er framd, tí bandupptøkuskipanin, sum higartil hevur verið nýtt, ikki sampakkar við seinastu dagføringarnar av telefonskipanini á alarm-sentralinum. Eisini verða upplýsingar um dagfesting og klokkutíð goymdar.

Persónar, sum eru í neyðstøðu, eru ikki altíð førir fyri at siga greitt, hvat er áfatt ella hvar tey eru – ella hava tey einfalt ikki stundir til tess. Tí er umráðandi at tryggja samskiftið við tey. Tað kann nýggja skipanin. Lætt og skjótt er hjá vaktleiðaranum á alarmsentralinum at avspæla eina samrøðu fyri á tann hátt at tryggja sær, at boðini eru rætt skild og at rætta hjálpin er umbiðin.

Nýggja skipanin verður somuleiðis brúkt til at skjalprógva alt samskifti, sum fer fram um alarmsentralin. Skjalprógvaða samskiftið kann á henda hátt nýtast í sambandi við eftirmetingar ella um kært verður um virksemið á alarmsentralinum. Skipanin hevur pláss til at goyma samskiftið, sum verið hevur seinasta árið.

Føroya Tele hevur staðið fyri arbeiðinum við nýggju dokumentatiónsskipanini. Føroya Tele hevur sambært loyvinum at reka fjarskifti skyldu at tryggja, at uppkall til alarmsentralin koma fram í telefonkervinum. Í hesum sambandi setti Føroya Tele herfyri upp nýggjan verkslara, neyðstreymútgerð o.a. á alarmsentralinum.

Fiskimálaráðið og Føroya Landfúti arbeiða fram ímóti øðrum loysnum í samsvari við frágreiðingina, sum í mars 2003 varð gjørd undir heitinum»Tilbúgvingarverkætlan Føroya«. Næsta stigið verður at gera tøkniligar ábøtur á skipanina, sum alarmsentralurin nýtir, tá t.d. sløkkilið og bjargingarfeløg verða tilkallað í sambandi við eldsbruna og aðrar vanlukkur.

Sosialurin
www.sosialurin.fo